## Ójøvn gongd hjá GM

Meðan ein General Motors verksmiðja í Evropa sigur fólk úr starvi, er ein onnur noydd er at seta eyka arbeiðslið inn. Kreppurakta Saab bilverksmiðjan í Svøríki boðar frá, at helst verður neyðugt at siga 750 fólkum úr starvi. 650 av hesum starvsfólkum eru sáttmálabundin, meðan 100 eru tænastufólk. Tað er amerikanska bilkonsernin General Motors, sum eigur Saab. Ein orsøk til ringu støðuna er fallandi eftirspurningur eftir Saab á amerikanska marknaðinium. Í fleiri mánaðir hevur leiðslan í Saab arbeitt við at bjarga fyritøkuni, sum herfyri fór í gjaldssteðg, undan húsagangi. Arbeitt verður framvegis við at finna eina loysn. Á týsku Opel verksmiðjuni í Russelsheim, sum eisini hoyrir til General Motors, er so stórur eftirspurningur eftir nýggja Opel Insignia, at neyðugt er at seta eitt eyka arbeiðslið inn, soleiðis at nú verður eisini arbeitt leygardag.

# Hevur arbeiði árið út

**Tað munnu vera fáar smáar fyritøkur, sum kunnu reypa av at hava arbeiði árið út, men tað kann snikkaravirkið á Skerinum í Skopun gera. So meðan aðrar fyritøkur noyðast at siga fólki upp, gongur Odmar Hentze í hesum døgum og hugsar um at seta fleiri fólk í starv**

VINNULÍV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Skopun legði fyri nøkrum árum síðani eitt ídnaðarøki av, og hóast tað í nógv ár bert var blandistøðin hjá J&K Petersen á økinum, eru nú fleiri virkir at finna har.

Sosialurin hevur áður havt samrøðu við stjóran á Grótvirkinum, Magnus Petersen, sum er eitt av virkjunum á ídnaðarøkinum, og aðrastaðni í blaðnum í dag er samrøða við Svein Høgnason, sum er stjóri á turkivirkinum Sp/f Skerið, sum er eitt annað av virkjunum á ídnaðarøkinum.

Fyri lítlum ári síðani varð so enn ein høll reist á sama øki. Tað var Odmar Hentze, ið leigaði gomlu goymsluhøllina hjá timburhandlinum Sand, og hevur innrættað hana sum snikkaravirki.

– Ja, tað eru einir sjey, átta mánaðir síðani vit byrjaðu snikkaravirkið her, sigur Odmar Hentze.

Hann hevur lagt seg eftir at framleiða úthurðar og vindeygu, og kann á tann hátt samstarva við hinum snikkaravirkinum í oynni heldur enn kappast móti tí.

– Vit gera onkur borð og onkrar benkur, men tað er fyri tað mesta úthurðar og vindeygu, og tað verður so at siga alt gjørt eftir bílegging, sigur Odmar Hentze.

Tá talan er um úthurðar er tað fyri tað mesta mahogni hurðar, sum teir framleiða, men nakað av furu úthurðum verða gjørdar eisini. Tað er alt eftir, hvat fólk ynskja.

Virkið hevur fingið eina rættiliga góða byrjan, og inntil fyri stuttum komu allar bíleggingar úr oynni.

– Tað er nústaðni nú, at bíleggingar byrja at koma aðrastaðni frá, annars hevur alt verið bílagt her suðuri frá, sigur Odmar Hentze.

Sum hjá so nógvum øðrum á Sandoynni hevur snikkaravirkið í Skopun einki merkt til nakra kreppu enn.

### Nógvar aðrar royndir

Tað hevur ikki altíð ligið í kortunum, at Odmar Hentze skuldi byrja sítt egna snikkaravirki – og tó.

– Nei, eg havi siglt nógv, áðrenn eg fór at arbeiða hjá kommununi sum umsjónarmaður í eini tvey-trý ár, áðrenn eg byrjaði við snikkaravirkinum, sigur Odmar Hentze.

Sum so mangur annar rýmdi Odmar Hentze av landinum, tá kreppan leikaði í, og tá arbeiddi hann eitt árs tíð á einum snikkaravirki í Danmark. Og tað dámdi honum ógvuliga væl. Men hvussu bar tað til, at hann valdi at fara undir eitt snikkaravirki?

– Eg veit ikki heilt. Eg havi so ofta hugsað um eitt lítið verkstað, og so kom hetta dettandi í hendurnar á mær. Fólk spurdi, hví eg ikki gjørdi okkurt slíkt, og so helt eg, at tíðin kanska var komin til tað, sigur Odmar Hentze.



*Odmar Hentze hugsar ikki í hesum døgum um at senda fólk til hús. Tvørtur ímóti ætlar hann at seta fleiri fólk í starv*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hann sigur, at hevði hann vita av at kreppan kom, hevði hann helst ikki farið undir hetta, men hann heldur kortini, at hann tók røttu avgerðina.

– Høllin er sum nevnt leigað frá timburhandlinum Sand, og eg setti hana sjálvur upp. Hetta eru nokk so passalig hølir at byrja við, haldi eg, sigur Odmar Hentze.

Sum omanfyri nevnt liggur snikkaravirkið á ídnaðarøkinum í Skopun.

– Her er rættiliga nógv virksemi rundan um, so tað er rættiliga hugaligt at koma her um morgnarnar, og økið liggur væl fyri eisini, sigur Odmar Hentze.

### Nógv bygging

Snikkaravirkið hjá Odmar Hentze hevur havt nóg mikið at gera, síðani tað byrjaði.

– Ja, tað hevur verið nóg mikið at gjørt. Og tað standa nógv arbeiði fyri framman her í Skopun. Útbyggingin av skúlanum er farin í gongd, og sum eg havi skilt, skulu fýra nýggj sethús byggjast her í Skopun í nærmastu framtíð eisini, so tað er nokk at gera, sigur Odmar Hentze.

Hann er sjálvur annar til arbeiðis á virkinum, og tað er í minna lagi.

– Vit hugsa um at taka ein lærling inn nakað skjótt, sigur Odmar Hentze.

Hann sigur, at fólk hava framvegis hug at byggja, hóast undirsjóvartunnilin hevur drúgv útlit.

– Sjálvandi vóna fólk at hann kemur, men sjálvt um tað sær eitt sindur svart út beint nú, so hava fólk ikki mist hugin at byggja. Og tunnilin kemur væl einaferð, tað málið er samtykt við so stórum meiriluta sum næstan einki annað mál, so vit rokna við, at hann kemur, sigur Odmar Hentze.

Tunnilin er ikki lívsneyðugur fyri júst virksemið hjá snikkaravirkinum, men hann hevur kortini týdning.

– Tað merkir, at vit mugu planleggja øðrvísi. Vit kunnu ikki bara loypa avstað til Havnar, tá vit vilja, sigur Odmar Hentze.

### Nokk í løtuni

Hingartil hevur verið nóg mikið at gjørt til levering á Sandoynni, og sum tað sær úr í løtuni líða teir onga neyð.

– Fyribils hava vit nógv mikið at gera her suðuri, men sjálvandi ætla vit okkum víðari, fáa vit møguleikan til tað, sigur Odmar Hentze.

Millum stóru bíleggingarnar er skúlin í Skopun, sum í hesum døgum verður útbygdur við trimum stórum skúlastovum umframt einum rættiliga stórum felagshøli. Og tann bíleggingin er mest sum komin í hús.

Nógv virksemi er á Sandoynni og serliga í Skopun, sum umframt tey virkini, sum eru á ídnaðarøkinum eisini hevur eitt flakavirki, sum hevur rættiliga nógv og støðugt arbeiði. Og tað er við til at halda positivu vónini uppi.

– Ja, avgjørt. Tað saman við trúnni upp á, at tunnilin kemur ger, at fólk eru positiv í Skopun, sigur Odmar Hentze.

Og fyri snikkaravirkið á Skerinum sær ógvuliga gott út í løtuni.

– Vit hava nokk av arbeiði fyri árið, so hjá okkum sær tað heilt gott út í løtuni, sigur Odmar Hentze.

Árið er sum kunnugt nýliga byrjað, so at hava arbeiði so nógvar mánaðir fram, hevur nógv at siga. So Odmar Hentze gongur í hesum døgum og umhugsar, at økja um starvsfólkatalið, antin tað so verður við einum manni ella við einum lærlingi.

---

Hann heldur tí, at skal man fylgja teimum politisku útmeldingunum frá landsstýrinum í løtuni, eru vónirnar ikki stórar.

– Men vit vóna kortini at landsstýrið ikki velur at avhøvda Sandoyartunnilin, sigur borgarstjórin á Sandi.

Hann heldur tó, at tunnilin hevur sera stóran týdning um ella tá hann einaferð kemur.

- Tað er einki at ivast í, at vegasamband, og serliga vegasamband við miðstaðarøkið og høvuðsstaðin í einum landi, hevur ótrúliga nógv at siga, og tí hevur man lagt so nógva orku í at ment tað sambandið kring alt landið. Og tað er einki at vast í, at vit, sum ikki hava fast samband, verða í einari heilt serligari støðu í so máta, um vit ikki fáa tað, og tann spurningurin átti eisini at verið viðgjørdur landspolitiskt. Hvat skal gerast við teir partar av landinum, sum ikki fara at fáa vegasamband, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hann sigur, at ynski er at fáa fast samband, og kemur tað, so hevur Sandoyggin allar verðsins møguleikar at menna seg javnbjóðis restini av Føroyum.

– Vit hava ovurhonds byggimøguleikar og náttúruna eiga vit so vakra sum nakrastaðni í landinum, og vit ætla ikki at geva skarvin yvir, um vit ikki fáa fast samband beinanvegin, sigur Páll á Reynatúgvu.

### Góð kommuna í góðari oyggj

Hóast borgarstjórin í Sands kommunu hevur ringar sónirum at undirsjóvartunnil kemur út í oynna í bræði, sær hann ikki so svart upp á framtíðina kortini.

– Vit eru í teirri støðu, at vit á Sandi hava tíbetur ótrúliga nógv børn eftir fólkatalinum. Vit hava sjálvandi eisini nógv eldri fólk, men tað ger tað, at í løtuni er tað kanska rættiliga tungt hjá teimum fólkunum, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, nevniliga tí vit hava ein rímiliga stóran yngri bólk og ein rímiliga stóran eldri bólk. Fólkini í miðalaldrinum hava tí rímiliga tungar byrðar at bera, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hann sigur tó, at hinvegin er sjálvandi ein ógvuliga góður gróðrarbotnur fyri framtíðina.

– Saman um tikið hava vit góðar vónir, tí vit vita tað, at vit búgva í eini góðari kommunu í eini góðari oyggj, sigur Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri í Sands kommunu.